# Trølladagur hjá havnarbørnum



Í dag millum klokkan 10 og 14 varð skipað fyri stórum trølladegi fyri børn í dagstovnunum hjá Tórshavnar Kommunu. Tiltakið byrjaði klokkan 10. Á ovara vølli var ein trøllahola, tveir básar við andlitsmáling, ein básur at gera trøllahalar, ein básur at gera ymiskt kreativt. Á skránni var eisini felagssangur, ævintýr, trællaleikur, sjónleikur og trøllaspøl av ymsum slag, og børnin hugnaðu sær óføra væl í góðveðrinum.




















